# Nøvn

## Jóannes Dalsgaard 70 ár



Í dag, mánadagin 26. juli, eru 70 ár liðin, síðani Jóannes Dalsgaard varð borin í heim. Jóannes var tingmaður í tíggju ár, og hann var í mong ár við í fremstu røð í skúla og mentanarhøpi.

Jóannes er ættaður úr Skálavík. Foreldrini vóru Marita, fødd Hentze, og ættað úr Skúvoy, og Hans Jacob Dalsgaard av Mølini í Skálavík.

Longu áðrenn hann í 1960 leyk málsligt studentsprógv, hevði Jóannes verið tvey ár til skips, og eftir at húgvan var komin á høvdið, var hann vikarur, arbeiðsmaður og sjómaður. Jóannes las søgu og franskt á lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Hann var virkin í føroyska studentaumhvørvinum, og eftir at hann var liðugur við lesturin, varð hann í 1973 settur í starv sum adjunktur á Føroya Studentaskúla.

Árið eftir, í 1974, vórðu HF skeið sett á stovn í Klaksvík, í Hoydølum og í Suðuroy, og Jóannes var leiðari á HF skeiðnum í Suðuroy fram til 1980, tá ið hann tók við sum landsskjalavørður.

Burtursæð frá einum ári, tá ið hann var rektari í Hoydølum, var Jóannes landsskjalavørður, inntil hann 1. januar 1998 tók við nýggjum starvi sum deildarstjóri á mentanardeildini í Mentamálaráðnum. Hetta var, tá ið mentamáladeildin í Tinganesi og landsskúlafyrisitingin formliga vórðu lagdar saman til táverandi Undirvísingar- og Mentamálastýrið, sum seinni skifti navn til Mentamálaráðið.

Jóannes røkti og myndaði hetta starvið, inntil hann 31. august 2007 legði frá sær. Hann hevði ábyrgd av hægri útbúgvingum, gransking og mentan. Nógvar broytingar vóru framdar í hansara tíð í Mentamálaráðnum. Eitt nú kann nevnast lóggávan um Mentanargrunn Landsins, Tjóðpall Føroya, nýggja lógin fyri Fróðskaparsetur Føroya, lógin um stuðul til mentan og list, og samanlegging av SvF og ÚF í Kringvarp Føroya, sum eisini fekk eina nýggja og nútímans kringvarpslóg.

Harumframt var Jóannes sera virkin í tí norðurlendska samstarvinum, har hann umboðaði Føroyar í fleiri norðurlendskum serfrøðinganevndum, eitt nú í vísmannabólki norðurlendska ráðharraráðsins, norðurlendska mentanargrunninum og í embætismannanevndini fyri norðurlendskt mentanarsamstarv.

Jóannes umboðaði eisini Føroyar í samráðingum við onnur lond, og leiddi hann eitt nú tær samráðingar við svenskar myndugleikar, sum endaðu við, at Kongsbókin við Seyðabrævinum varð latin Føroyum aftur. Jóannes røkti eisini - samstundis sum hann var deildarstjóri - í avmarkaðum tíðarskeiðum størvini sum ávikavist settur landsskjalavørður og settur landsantikvarur.

Í mai 1997 vardi Jóannes Dalsgaard sum tann fyrsti Ph. D. ritgerð á Fróðskaparsetri Føroya. Heitið var "Fylking 75 ár. Ein rannsókn av verkamannarørsluni á Tvøroyri og ein lýsing av málum, menning, skipan og úrslitum hennara – við denti á tíðarskeiðið 1915-1951."

Umframt hesa slóðbrótandi ritgerðina og so nógvar aðrar greinar um politisk og søgulig evni í føroyskum bløðum og útlendskum tíðarritum, so hevur Jóannes skrivað stuttsøgur í bløðum og tíðarritum, og í 1987 gav hann út yrkingarsavnið Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari.

Jóannes varð valdur á ting fyri Javnaðarflokkin í Suðurstreymi í 1980 og aftur í 1984, og í 1991-1992 var hann aftur í tinginum. Tá var hann limur í Norðurlandaráðnum, sum hann hevur sera stóran áhuga fyri.

Politiska hugsjónin var greið, analytisku evnini skørp, og tá ið pennurin var spískur og evnini at røða góð, so er tað einki at siga til, at Jóannes var markantur tingmaður, men á valinum í 1994 lat hann seg ikki stilla uppaftur. Harvið misti tingið ein tingmann, sum var sera áhugaður í og innarlaga í altjóða viðurskiftum, og sum støðugt stríddist fyri, at tað almenna skuldi veita mentanini betri kor og vísti á, at tað á øllum økjum hevur verið teimum samfeløgum at gagni, sum hava raðfest almennan mentanarpolitikk høgt og hava veitt stórar játtanir til mentanina.

Jóannes er giftur Eyðnu Ellefsen úr Miðvági. Tey eiga tríggjar gentur: Marita, Marjun og Kristina.

Føðingardagin er Jóannes Dalsgaard burturstaddur.

J

## Merkisdagar

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 31. juli hava Sigrid og Símun Dalsgaard, Boðanesgøta í Hoyvík verið gift í 50 ár. Tey verða burturstødd.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 13. august kunnu Ásla og Tórbjørn Poulsen í Havn halda gullbrúðleyp. Veitsla verður sama kvøld fyri innboðin. Tey sum annars hava hug at hitta brúðarparið eru vælkomin heima í Bóndabrekku leygardagin eftir kl. 15.

**Silvurbrúdleyp**
27. juli hava Krisfinn og Maria Christiansen, Klaksvík, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 17. august hava Jónleyg og Fríðálvur Bláhamar, Vestmanna, verði gift 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 21. august frá kl. 12 til 18 í ítrottarhøllini í Vestmanna. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, verða vinaliga biðin um at siga frá innan 4. august á tlf. 424407.

**90 ára føðingardagur**
Mánadagin 26. juli verður Hanna Ziska, Klaksvík, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin á Sjómansheiminum í Klaksvík kl. 18 sama dag. Tey, ið vilja heilsa upp á Honnu, eru hjartaliga vælkomin.

**85 ára føðingardagur**
Ólavssøkuaftan 28. juli verður Otto Sørensen, Tórshavn, 85 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Otto føðingardagin, eru hjartaliga vælkomin í Tórugøtu 27 (hjá Sunnvu) 28. juli millum kl. 10 og 14.

**75 ára føðingardagur**
Sunnudagin 1. august fyllir Helgir Thomsen í Hvalba 75 ár. Tey, ið vilja gleða Helgir á degnum eru vælkomin heim til hansara millum kl. 14 og 18.

**75 ára føðingardagur**
21. august fyllir Elisabeth Joensen í Vági, fyrrverandi fyrustøðukvinna hjá heimarøktini, 75 ár. Í hesum sambandi bjóðar Elisabeth til brunch í Billiardhúsinum, leygardagin 14. august, frá kl. 10-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Prógv**
23. juni fekk Andrass Jógvansson, Tórshavn prógv sum Master of Arts in Economics with Honours of the First Class frá Heriot Watt University í Edinburgh.



Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum